Johan Dahl
løgtingsmaður

Nr. 64/2019

Fyrispurningur eftir tingskipanini §52 a

Fyrispurningur um serfrøðinganevnd at kanna havbit og skeljaaling í Føroyum, settur landstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a).

1. Hevur landsstýrismaðurin sett serfrøðingarnevndina, ið skal kanna møguleikan fyri havbiti og skeljaaling í Føroyum, sum eitt samt Løgting hevur biðið landsstýrismannin um at gera?
2. Nær kann væntast, at ein frágreiðing verður tøk um møguleikar fyri havbiti og skeljaaling?

Viðmerkingar:

Í samgonguskjalinum frá 14. september 2019, undir vinnumálum, verður dentur lagdur á at fremja hetta málið um havbit og aðra aling - og har stendur: "Møguleikarnir fyri aling á landi skulu eisini troytast, og arbeiðast skal eisini við møguleikum fyri havbiti og aðrari aling, so sum tara- og skeljaaling."

Í løgtingmáli nr. 128/2017, samtykti eitt samt Løgting tann 21. apríl 2018, eftir tilmæli frá einari samdari Vinnunevnd, at heita á landsstýrið .... "um at seta niður bólk av serfrøðingum til at kanna og gera frágreiðing um, hvussu Føroyar kunnu gera seg galdandi innan havbit av laksi, og hvussu farast kann undir skeljaaling í Føroyum og grundað á frágreiðingina leggja fyri Løgtingið frágreiðing um hetta."

Viðmerkingarnar frá einum samdum Løgtingi vóru m.a., at tað er avgerandi fyri Føroyar at hava fjøltáttaðar vinnumøguleikar, og tí skuldi arbeiðast við hesum, tí vit landafrøðiliga liggja so væl fyri, at tað er eyðsæð, at her eru møguleikar, sum mugu troytast til tess at tryggja, at Føroyar kunnu verða eitt uppaftur ríkari samfelag til fyrimunar fyri allar føroyingar.

Havbit og skeljaaling kundu blivið eitt gott ískoyti til føroyska búskapin og eisini skapt nýggj arbeiðspláss. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 13. mars 2020

Johan Dahl